R.S. 796. St. 277. Des-as. Sungin í C

```
C                               G7
Tyngist tú av byrðum og ei hjálp kann sjá,
G7                                        C
møðist tú av vegnum, sum tú steig inn á!
C                                         F
Harrin fylgist við tær, ei tú óttast skalt,
F                    C       G          C
hann er tann, ið styrkir - Jesus fatar alt.
  Niðurlag:,
C                    F                C
Ja, hann fatar alt, hann vil leiða teg,
G7
kallar eftir tær:
G7                 C
Hvíl teg her hjá mær!
C                                   F
Alla tína framtíð trygt tú leggja skalt
                  C          G          C
í hans kærleiks hendur - Jesus fatar alt.
```

2. Hvørja byrði, sum tú bert, hann taka vil,
hann ein dýrur vinur er at fara til;
sært tú ongan útveg, er alt myrkt og kalt,
miss ei mótið, vinur - Jesus fatar alt!

3. Tá tær freisting møtir, Jesus hjálpa kann,
lívsins mongu gátur loysir eina hann;
hvat ið enn kann bresta, til hans orð teg halt,
aldri mást tú ivast - Jesus fatar alt!

4. Troytta sál, hann kallar: Kom og hvíl teg her!
Tykist stundum tungført - best hans leið tó er;
legg tú tína framtíð - sáligt er tá valt -
í hans særdu hendur - Jesus fatar alt!

**Birdie Bell.*
*(P.W. Háberg týddi).*